Hiddenfjord
Raised in the wild

P/F LUNA
á Fútakletti
360 Sandavágur
Faroe Islands

Tel +298 66 21 00
www.hiddenfjord.com
Reg no. 2258
Vat. no. 418.285

# Viðmerkingar til broytingar í elveitingarlógini

*Havandi í huga* at heimurin er í einari álvarsligari og vaksandi veðurlagskreppu;
*Havandi í huga* at bert helmingurin av el-orkuni í Føroyum er grøn;
*Ásannandi* at orkuskiftið gongur ov seint;
*Ásannandi* at vit brúktu 7% av føroysku el-orkuni í 2023 og at okkara nýtsla fer at økjast;
*Ásannandi* at 16 % av okkara CO2-útláti kemur frá el-nýtslu;
*Ásannandi* at el-prísurin er nógv øktur fyri vinnukundar seinastu árini – heili 48% síðani 2018,

**hava** vit í Hiddenfjord fylgjandi viðmerkingar til broytingar í elveitingarlógini:

Vit ynskja at sleppa at framleiða el-orku úr varandi orkukeldum til egna nýtslu. Hetta hevði minkað um okkara CO2-útlát og minkað um okkara útreiðslur til elorku. Sostatt hevði hetta loyvt okkum at tikið etiska ábyrgd og betrað um okkara kappingarføri.

Vit ynskja **ikki** at framleiða orku at selja til onnur, í kapping við SEV. Vit taka fult undir við at SEV hevur ábyrgdina av at føroyska el-netið er vælútbygt, dagført og trygt, soleiðis at vit í Føroyum hava hágóðsku elorku.

Vit hava tørv á at knýta okkara el-framleiðslu í føroyska elnetið, sum SEV hevur bygt og ment gjøgnum nógv ár. Prísurin fyri at sleppa at knýta í netið eigur at vera ásettur, soleiðis at tað er eggjandi hjá orkukrevjandi fyritøkum at framleiða el-orku til egna nýtslu, og sostatt vera við til at skunda undir grøna orkuskiftið.

**Pkt. 8 og pkt. 9**
Tí fegnast vit um lógarbroytingarnar í **pkt. 8 og 9,** sum leggja upp til, at elframleiðsla størri enn 1 MW til egna nýtslu, ikki skal í alment útboð. Harafturat leggja lógarbroytingarnar upp til at knýtast kann í føroyska elnetið og at avlopsorka frá elframleiðslu til egna nýtslu, kann leiðast inn á elnetið.

Avmarkingar eru settar í lógina, fyri at tryggja, at talan veruliga er um eginnýtslu. Hugtakið eginnýtsla eigur ikki at kunna nýtast sum bakdyr, við tí fyri eygað, at snúgva sær undan reglunum um alment útboð. Vit taka undir við hesum avmarkingum.

**Pkt. 16**
Vit fegnast eisini um, at **pkt. 16** leggur upp til, at SEV kann gera avtalur um el-prís við størri kundar, sum eitt nú eru íbundnir *háspenning* ella kunnu veita SEV *skipanarberandi tænastur*. Í okkara virksemi hava vit skipanir, ið kunnu vera til gagn fyri føroyska el-netið (generatorskipan sum back-up). Vit eru tí sinnað at samstarva við SEV og á tann hátt minka um íløgutørvin hjá SEV.

Hugaligt er at síggja, at lógaruppskotið frá núverandi landsstýri leggur upp til eina breiða politiska semju, av tí at tað í stóran mun byggir á semjuskjalið, ið undanfarna landsstýrið og Kommunufelagið undirskrivaðu.

**Atli Gregersen, stjóri**